# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

21. juli fingu Neli-Florica Jacobsen og Sólfríður Dam Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigaði 4200 gr.

28. juli fingu Beinta Lisberg, Sumba og Rógvi Joensen, Oyri, eina dóttur í Keypmannahavn. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

1. august fingu Vár Mortensen og Jón Midjord, Hov, ein son. Hann var 46 cm langur og vigaði 2120 gr.

1. august fingu Elken Eliasen Stølen, ættað úr Mikladali og Per Sigbjørn Stølen, Storås, Norra, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3965 gr.

4. august fingu Kristvør og Leif Mohr, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3810 gr.

5. august fingu Mirjam og Pól Frits Høj, Strondum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3950 gr.

6. august fingu Vivian E. D. Johansen og Lennard K. Pedersen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2950 gr.

7. august fekk Jenny Thomassen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2585 gr.

8. august fingu Elisabet Nielsen og Mikael Kristiansson Blak, Argjum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4300 gr.

8. august fingu Fríðbjørg og Erling Joensen, Kambsdali, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3350.

8. august fingu Elin Mørkøre og Bergar Juul, Fuglafjørður, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4050 gr.

9. august fingu Guðrun Midjord og Johan Nystrøm, Kollafirði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

## 60 ár

13. august verður Gullak Arngrimson Madsen 60 ár. Opið hús verður frá kl. 14.00 á Søren Toftsvej 14, Hirtshals.

## 80 ár

14. august fyllir Bentura Nielsen, fyrrverandi sjúkrasystir, Tvøroyri, 80 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

## Silvurbrúdleyp

Mánadagin 15. august kunnu Maria og Hanus Poulsen hava silvurbrúdleyp. Brúdleypsadr.: Herredsfogedvej 28, 8900 Randers, Danmark.

Mánadagin 15. august hava hjúnini Frígerð og Pauli Nónklett á Glyvrum verið gift í 25 ár. Opið hús verður í heiminum á Geilarvegi 8 frá kl. 17.00.

## Brúdleyp

Í dag, 13. august kl. 13.00 giftast í Vor Frelsers Kirke í Vejle Paulina Hansen úr Saltangará, búsitandi í Vejle og Jens Christiansen, Vejle. Eftir vígsluna verður móttøka í Sognehuset, Worsaaesgade 2.

Brúdleypsadr.: Munkebjerg Hotel, Munkebjergvej 125, 7100 Vejle.

Í dag, 13. august kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Maja Højsted og Danny Osberg Hansen. Veitslan verður hildin fyri innbodnum á Hotel Norð kl. 19.00.

Í dag, 13. august kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Hildur Steingrímsdóttir og Sigurð Hansen, bæði úr Havn. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

## Prógv

Arni V. Petersen, Syðrugøta, hevur í august lokið prógv sum matvørukandidatur frá DTU, Lyngby og North Carolina State University, USA.

# Virkin útróðrarmaður fyllir 75



Kemur tú til Funningsfjarðar, kanst tú vera heppin og síggja ein mann kvika sær oman í bátahylin ella renna niðan í gerðið. Tey flestu, sum hava upplivað hetta, munnu ivaleyst halda, at talan er um ein spelknan unglinga, sum fer til útróðrar og ikki um ein 75 ára gamlan mann, sum er í hálvt við sítt dagliga yrki.

Týsdagin 16. august fyllir Erling Hansen í Funningsfirði 75 ár.

Erling varð føddur í Funningsfirði í 1930. Foreldrini vóru Edmund Hansen úr Funningsfirði og Alma Jóhanna Petersen, ættað úr Hoygarðinum í Funningi. Alma og Edmund áttu nýggju børn: Tvillingarnir Sámal og Malan (Mella), Erling, Svend, Leivur, Amy, Ásmund, Margit og Sólrun. Sólrun doyði bert nakrar dagar gomul, Amy doyði í 1971 og Sámal doyði í 1986.

Orsaka av seinna heimsbardaga slapp Erling ikki til skips, fyrr enn hann var vorðin 15 ár, sum var lutfalsliga gamalt tá í tíðini, men longu tá var hann ein vandur útróðrarmaður. Ikki er langt út á fiskileið á Norðhavinum og tiltikin var Funningsfjørður fyri ta nógvu sildina, ið var fingin inni á fjørðinum bæði við gørnum og nót. Í hesum arbeiði luttók Erling frá smádreingjaárum. Tá bátur var í húsinum, kom eisini mangan boð eftir Erlingi at skjútsa fólk til og frá hinum bygdunum á fjørðinum.

Í 1960 giftist Erling við Sólbjørg Danielsen úr Havn. Tey eiga 6 børn Birgit, Edny, Almu, Hans Erling, Edmund og Barbaru.

Sólbjørg og Erling eiga nú 16 barnabørn.

Sjálvt um árini nú eru vorðin mong, troytir Erling framvegis sjógvin. Hann eigur bátin »Alma J.«, sum hann er á fjørðinum við, tá tað liggur fyri. Hann hevur fiskiloyvi eftir hummara á Funningsfirði, og er veðrið til vildar, fer hann eisini onkran túr við snelluni. Um sild er inni á fjørðinum, er hann eisini úti við gørnum.

Ikki bert í Føroyum hevur Erling roynt útróðurin, bæði í Íslandi og Grønlandi hevur hann eisini verið útróðrarmaður.

Erling hevur ikki bara roynt sjógvin. Í Danmark royndi hann seg sum húskallur á einum bóndagarði. Eina tíð arbeiddi hann á Skála Skipasmiðju. Nøkur ár koyrdi hann eisini skúlabørnini í bygdini til skúlagongd á Skálafjørðinum.

Handil høvdu tey eisini í nøkur ár, og einaferð var tað tann stóra dillan hjá ungfólki í Eysturoynni at koyra til grillbarrina í Funningsfirði, sum Sólbjørg og Erling høvdu.

Álitisstørv hevur Erling eisini røkt. Hann var bygdaráðslimur nakrar setur. Grindaformaður var hann eisini í fleiri ár.

Tá summarferian er, koma børn og barnabørn at ferðast og hjálpa til við at hoyggja gerðið, sum er oman fyri húsini. Tá eru eini 20 fólk í húsi, men har hjartarúm er, er eisini húsarúm og hjartarúm trýtir ikki hjá Sólbjørg og Erlingi. Tað er ikki uttan orsøk, at barnabørnini dáma so væl at vitja.

Blíðskapurin hevur altíð verið óførur heima hjá Sólbjørg og Erlingi, vart tú kendur ella fremmandur, líka vælkomin vart tú fyri tað. Tey munnu ikki vera so fá, sum hava gist hjá teimum í Funningsfirði.

Hjálpsamur og ósjálvsøkin er hann sum fáur; verður heitt á hann, er hann skjótur at sleppa sínum egna og veita øðrum eina hjálpandi hond. Serliga eru børnini takksom fyri ta hjálp, sum tey bæði Sólbjørg og Erling hava veitt teimum, líka frá barnsbeini og til nú, tá øll sjálvi hava sett búgv.

Í dag leggur hann ikki so nógv fyri í útróðrinum, men kvikur er hann framvegis, og kemur tú á tal við hann, finnur tú skjótt út av, at her er ein maður, sum hevur gott skil fyri tí, sum fyriferst bæði á sjógvi og landi.

Føðingardagin heldur hann týsdagin í Havn hjá Edny og Páll í Tjarnarlág 15. Tey, sum vilja heilsa upp á Erling, eru vælkomin frá kl. 18.

**Heilsan**
**Børn, svigarbørn og barnabørn**

# Karin Kastalag 60 ár



Karin Kastalag á Glyvrum fyllir 60 ár mánadagin 15. august.

Karin er av Toftum og verður av bygdafólkunum oftast kalla Karin Dahl.

Karin var við á fyrsta holdinum sum tók prelemінereksamiu á Glyvrum, og fór síðani til Danmarkar at nema sær kunnleika um mál, og tók prógv sum korrespodentur á Svendborg Handilsskole í 1967 í týskum og enskum, har afturat næm hon sær kunnleika um maskinskriving og stenografi, hesi bæði seinnu fakini eru helst ikki til longur.

Eftir lokna skúlagongd arbeiddi Karin sum tímalærari við Runavíkar kommunuskúla í 25 ár.

Tá íð Bygdasavnið FORNI á Glyvrum varð stovna, var Karin ein av teimum sum var við, og hevur saman við Mariu Jacobsen á Langanesi, sum formanni, sett savni upp og umsiti tað. Tær hava eisini givið blaðið Keraldi út.

Fyri uml. 2 árum síðani, vendi Bygdasavni á Toftum sær til Karina, við fyrispurningi um hon vildi arbeiða sum samskipari av virkseminum hjá Bygdasavniunum, og tað játtaði Karin.

Vit, maður, børn og ommubørn, vilja takka tær fyri alt tú ert fyri okkum, og ynskja tær tillukku við degnum, og alt gott í framtíðini.

Tey, sum hava hug at heilsa uppá Karin, kunnu koma í Kvinnufelagshúsið á Glyvrum leygardagin 20. august frá kl. 19.00.

### Dagurin

**13. august. Hippolytos,** deyður í umleið 235. Helst ein grikki, sum gjørdist ein av teimum best kendu kristnu rithøvundunum í Róm í 3. øld. Hann var tikin av døgum við at verða slitin millum hestar, sum navn hansara sipar til.

*Rasmus Rasmussen (á Háskúlanum) varð føddur hendan dagin í 1871.*

**14. august. Eusebius.** Fleiri halgimenni at navni Eusebius eru knýtt at degnum 14. august.

**15. august. Mariumessa.** Hildin til minnis um himmalsferð Mariu. Dagurin varð eisini róptur *mariumessa í hoyna*. Tendringin um hetta mundið eitur í hoyna.

*Jákup Jakobsen doyði hendan dagin í 1918.*